Nýggja løgtingsuppskotið um ósemjur á arbeiðsmarknaðinum:

# Fullkomiliga nýggj skipan

**Verður uppskotið hjá Vinnumálaráðnum samtykt av løgtinginum, verður talan um eina nýggja skipan á arbeiðsmarknaðinum. Uppskotið um fastan gerðarrætt leggur seg tætt at einum arbeiðsrætti, sum vit kenna í londunum rundan um okkum.**

ÓSEMJUR Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM
*Páll Holm Johannesen*



*Uppskotið frá Vinnumálaráðnum, ið er sent til hoyringar hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, fevnir um at seta ein fastan gerðarrætt á stovn. Verður uppskotið endaliga samtykt, verður talan um fullkomuliga nýggja skipan til loysn á trætum á føroyska arbeiðsmarknaðinum*

*Mynd: savnsmynd*

Seinastu viku sendi Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, feløgunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum eitt uppskot til hoyringar um skipan til loysn á ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Í rúgvumikla uppskotinum verður millum annað lagt upp til at seta ein fastan gerðarrætt á stovn. Verður uppskotið til løgtingslóg samtykt, verður talan eina fullkomiliga nýggja skipan um loysn á trætum á arbeiðsmarknaðinum.

### Minnir nógv um arbeiðsrætt

Flestu avtalur á føroyska arbeiðsmarknaðinum í dag millum arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar fevna um ein gerðarrætt. Skipanin við gerðarrætti hevur verið nýtt til stríðsmál, sum fata um tulkingar av sáttmálainnihaldi.

Gerðarrætturin er ikki nakar formellur stovnur, men ein rættur, sum verður settur á stovn, so hvørt sum stríðsmálini taka seg upp. Seinnu árini hevur gerðarrættur verður nýttur nakrar ferðir, og hava tað verið fakfeløgini og arbeiðsgevararnar, sum bæði hava valt umboð í gerðarrættin.

Í Føroyum hava vit aldrin havt ein arbeiðsrætt, sum vit kenna í londunum rundan um okkum. Arbeiðsrættur hevur verið nýttur at taka sær av sáttmálabrotum, og kann tí ikki samanberast við tað, sum føroyingar kenna sum gerðarrætt, ið hevur uppgávu at loysa trætur um tulking av sáttmálum.

Nýggja uppskotið um fastan gerðarrætt hjá Bjarna Djurholm leggur seg nógv at arbeiðsrættinum. Í uppskotinum, sum er sent til hoyringar hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, verður lagt upp til ein stovn, sum bæði skal taka sær av brotum og tulkingum av sáttmálum. Ein kann tí kalla nýggja stovnin eina samanrenning av arbeiðsrætti og gerðarrætti.

Fasti gerðarrætturin fevnir um ein varandi stovn. Gerðarrætturin, vit kenna í dag, verður bert settur á stovn, tá trætur á arbeiðsmarknaðinum hava tikið seg upp, og tí er talan um eina nýggja skipan.

Í uppskotinum úr Vinnumálaráðnum verður lagt upp til, at fasti gerðarrætturin skal hava 13 fastar limir og 26 varalimir.

### Umfatar bara sáttmálaskeiðið

Fasti gerðarrætturin kann bert taka støðu til ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, so leingi sáttmáli er millum stríðandi partarnar. Seinnu árini hava fleiri av drúgvu verkføllunum verið eftir, at sáttmálaskeiðið millum partarnar er gingið út.

So seint sum í vár varð havt á tunguni, at høvdu vit havt ein fastan gerðarrætt, so var sloppið undan drúgva verkfallinum, men hetta er mistulking, tí fasti gerðarrætturin kann ikki gera skera ígjøgnum, so leingi eingin sáttmáli er millum partarnar.

Bjarni Djurholm:

# – Uppskotið er eitt stig rætta vegin

**Tá partarnar á arbeiðsmarknaðinum sjálvir hava so torført við at semjast um ein fastan gerðarrætt, má tað almenna gera sítt til, at ferð kemur á málið við einum stovni, ið skjótt og greitt kann avgreiða ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, sigur Bjarni Djurholm**

ÓSEMJUR Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM
*Páll Holm Johannesen*



*Landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm er sannførdur um at nyggja uppskotið um fastan gerðarrætt er eitt stig rætta vegin*

*Mynd Savnsmynd*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum er ikki í iva um, at nýggja uppskotið um loysn á ósemjum á arbeiðsmarknaðinum er eitt stig rætta vegin.

– Út frá øllum ósemjum, sum hava eyðkent bæði privata og kanska serliga almenna arbeiðsmarknaðin seinastu árini, eri eg sannførdur um, at nýggja uppskotið avgjørt er eitt stig rætta vegin, sigur Bjarni Djurholm.

Spurdur, um tað er rætti hátturin at lóggeva fyri einum føstum gerðarrætti, heldur enn at lata feløgini sjálvi á arbeiðsmarknaðinum koma til sættis um at seta ein fastan gerðarrætt á stovn, svarar Bjarni Djurholm, at tíðin hevur víst, at partarnar hava havt sera ilt við at semjast um ein fastan gerðarrætt, og tískil má tað almenna ger sítt til, at ferð kemur á málið við at seta ein stovn, ið skjótt og greitt kann avgreiða ósemjur á arbeiðsmarknaðinum.

### Arbeitt leingi við málinum

Landsstýrismaðurin sigur, at arbeiðið, við einum føstum gerðarrætti, hevur leingi verið í umbúna.

– Vit høvdu av fyrstani tíð eina nevnd við umboðum fyri báðar partar á arbeiðsmarknaðinum, men tað arbeiðið datt niðurfyri, og síðan hevur umsitingin arbeitt víðari við málinum, greiðir Bjarni Djurholm frá.

Fyrsta uppskotið um loysn á trætum varð fyri tveimum árum síðani sent feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, men tá fekk tað kalda móttøku, og tí varð ikki farið víðari við málinum. Nú verður so roynt aftur, og landsstýrismaðurin vónar, at meira spyrt burturúr hesaferð.

– Vit hava seinnu árini havt fleiri mál, eitt nú Brimlamálið, sum átti at sannført partarnar, at neyðugt er við einari regulering á arbeiðsmarknaðinum, og tí er tað mín vón, at uppskotið fær betri móttøku hesaferð, sigur Bjarni Djurholm

Spurdur, um hann væntar, at fakfeløgini fara at geva ilt av sær, nú ein partur av verkfalsrættinum møguliga verður tikin frá teimum, svarar landsstýrismaðurin, at tað er ringt at siga, men bæði partarnir á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum áttu at sæð, at fasti gerðarrætturin er eitt positivt aktiv fyri partarnar.

– Spyrt tú umboð fyri arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar í Norðanlondum, so svara tey bæði, at arbeiðsrætturin hevur verið eitt positivt aktiv hjá teimum, og tá arbeiðsmarknaðurin í norðurlondum er ein tann best skipaði í heiminum, dugi eg ikki at síggja, at vit ikki skulu flyta okkum sama veg. greiðir Bjarni Djurholm at enda frá.



# Teir skerja demokratisk rættindi



*Ingeborg Vinther og Føroya Arbeiðarafelag fara ikki at sita hendur í favn, nú Bjarni Djurholm og Vinnumálaráðið hava lagt uppskot fram um grundleggjandi broytingar í viðurskiftunum á arbeiðsmarknaðinum, sum feløgini meta skerjir verkfallsrættin og demkratisku rættindini yvirhøvur*

**Soleiðis sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag um nýggju lógaruppskotini hjá Bjarna Djurholm, sum snúgva seg um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum og innihalda undantøk í verkfallsrættinum og lógarfestan arbeiðs ella gerðarrætt og víðkaðar heimildir til semingsmenninar. Ingeborg Vinther finnur valla orð og henni koma til hugs diktatorisk viðurskifti. Fakfeløgini hava verið lagalig við alivinnuna undir verkføllum, meðan vinnan eftir øllum at døma hinvegin útflytur sjálvdeyðan fisk, sigur Ingeborg Vinther**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Dagfinn Olsen*

– Hetta er ræðuligt, eg finni ikki orð fyri tí. Hetta er óhugsandi í einum demokratiskum landi, har vit hava verkfallsrætt og samráðinagrrætt. Teir skerja fakfeløgini og demokratisku rættindini, sigur forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, sum heldur, at myndugleikarnir gloyma, at tað eru tveir partar á arbeiðsmarknaðinum.

– Teir leggja eftir fakfeløgunum, men gloyma, at tað eru tveir partar, nevniliga eisini arbeiðsgevarasíðan, sigur forkvinnan í FA um uppskotini frá Vinnumálastýrinum um lógarfestan arbeiðsrætt og undantøk í lógini um tøku av sjúkum djórum, fiski, har tað slepst undan vekfalli.

– Teir leggjast eftir fakfeløgunum, hóast vit hava verið sera lagalig undir verkfallinum herfyri, meðan teir, arbeiðsgevararnir, eftir øllum at døma hinvegin hava útflutt sjálvdeyðan fisk, sigur Ingberog Vinther, sum vísur á, at tað er ikki fakfelagsrørslan, sum hevur skuldina av vána støðuni í alivinnuni.

– Og at siga, at vit eru meint rakt av verkføllum seinnu mongu árini, tað passar ikki. Í 1985 t.d. vardi verkfallið í einar 5 dagar, í 1987 var verkfall/lock out í 3 vikur og í 1991 tað sama í einar 5 dagar, sigur Ingeborg Vinther.

– Uppskotini eru hol í høvdið og har er alt við í undantøkunum, flutningur og útflutningur. Teir skerja fakfeløgini og tað er at taka demokratisk rættindi, verkfallsrættin, og tað er ófatuligt, at teir leggjast eftir fakfeløgunum, eftir at tey hava verið lagalig undir verkføllum, sigur forkvinnan í FA.

– Og vert er at minnast, at kreppan í alivinnui er ikki orsakað av fakfeløgunum, men tí einki eftirlit er við alivinnuni og fiskurin er strongdur, sigur forkvinnan í FA.

### Valt gott tíðspunkt

Uppskotini um lógarbroytingar hava við sær lógarfestan arbeiðsrætt, víðkan av heimildum hjá semingsstovninum og broytingar, so tað slepst undan verkfalli, tá talan er um tøku av sjúkum fiski.

Uppskotini eru løgd til hoyringar og viðmerkingar skulu vera inni tann 25. august.

– Vinnumálaráðið og Bjarni Djurholm hava valt sær eina lagaliga løtu, mitt í hægstu summarfrítðini, tá flest øll eru burturstødd og skrivstovur eru stongdar. Og so skulu viðmerkingarnar vera teimum í hendi aftur longu 25. august, sigur Ingeborg Vinther, sum sjálv hevur úr at gera og er burturstødd í arbeiðsørindum komandi mongu dagarnar.

– Tað er ófatuligt, at Fólkaflokkurin fær aðrar flokkar við uppá hetta. Hetta eru tiltøk, ið skerja demokratsiku rættindini og fakfeløgini, men tiltøkini bøta ikki ringu støðuna í alivinnuni. Bert verða fakfelagsrættindini skerd meðan sáttmálaloysi er, sigur Ingeborg Vinther, sum heldur, at slíkt hendir annars bert í londum, ið hava diktaturstýri.

– Teir bjarga ikki alivinnuni við hesum, men venda bert fakfeløgunum og fólki mótvegis slíkum tiltøkum. Tað hjálpir ikki bert at leggja eftir fakfeløgunum, tí samfelagið er í kreppu, har skal annað til, viðmerkir Ingeborg Vinther.

### Sita ikki hendir í favn

– Vit fara ikki at sita hendur í favn, men sera óheppið er tað, at hetta hendir í hægstu summarfrítiðini, nú politikarar eru komnir aftur til arbeiðis, eftir frítíð síðani maimánað, sigur Ingeborg Vinther.

– Eg vil síggja teir flokkar, ið skerja fakfelags- og demokratisku rættindi. Teir leggjast altíð eftir fakfeløgunum og gloyma, at tað eru tveir partar. Flokkarnir skulu eisini liva aftaná, at teir hava skert demokratisku rættindini. Og trekkja teir tenninar úr fakfeløgunum, so tey ikki virka meir, hvat hendir so?, spyr Ingeborg Vinther, sum spyr, hvar andstøðan er í hesum og t.d. ein flokkur sum Javnaðarflokkurin, sum søguliga hevur vart áhugamál arbeiðaranna.

– Somu uppskot og viðurskiftini hava verið uppi fleiri ferðir áður, men hava ongantíð vunnið frama. Hví?

– Nú er eftir øllum at døma politisk undirtøka í samgonguni, men taka allir flokkar á tingi veruliga undir við slíkum?, spyr Ingeborg Vinther, sum saman við øðrum fakfelagsfólkum seinni fer at viðgera tilfarið, ið teimum er sent til hoyringar, men hon leggur dent á, at fakfelagsrørslan ikki ætlar at sita hendur í favn.

## Má arbeiða saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum

**Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, kennir enn ikki smálutirnar í uppskotunum viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum frá Vinnumálastýrinum, men hann metir, at partarnir mugu takast við upp á ráð**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Dagfinn Olsen*

Vinnumálastýrið og Bjarni Djurholm hava lagt fram uppskot um lógarfestan gerðarrætt ella arbeiðsrætt, um víðkaðar heimildir til semingstovnin og um undantøk í verkfalli, tá tað snýr seg um sjúkan fisk.

Ingeborg Vinther spyr, um andstøðan, og serliga Javnaðarflokkurin, tekur undir við uppskotunum hjá Bjarna Djurholm, sum hon metir skerja verkfallsrætt og demokratisk rættindi?

Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, sigur, at tað nyttar ikki hjá landsstýrismanninum í vinnumálum at diktera, men at hann heldur má taka partarnar á arbeiðsmarknaðinum við uppá ráð.

– Nú kenni eg ikki smálutirnar í uppskotunum, men tað hevur nakað við ein gerðarrætt at gera, sum er blivið tulkað sum arbeiðsrættur, men eg kann ikki fara í smálutir, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Hetta er ein ásannan av truplu støðuni undir verkfallinum. Har varð ásannað av pørtunum, at tilgongdin at finna semju var long og trupul og at ov fáar royndir blivu gjørdar at finna semju, áðrenn greitt var, at verkfall kom burturúr. Men hinvegin er greitt, at góðtakast kann ikki, at verkfallsrætturin skal skerjast, men tilmælast má, at sjálv mýkingin undir samráðingum verður tikin til viðgerðar, sigur formaður Javnaðarfloksins.

– Tað nyttar ikki hjá Bjarna Djurholm, um hann ikki tekur partarnar á arbeiðsmarknaðinum við uppá ráð og fær arbeiðsmarknaðin við. Hann hevur longu sligið ein tóna, so tað verður tulkað sum ein arbeiðsrættur, og so er byrjanin betur ógjørd, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Hann heldur seg kunna diktera nakrar loysnir, men tað ber bert til at finna loysnir saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Viðvíkjandi arbeiðsrætti, so hava feløgini sagt, hvat tey kunnu góðtaka, so tað er ikki so ringt at vita, hvussu ein skal fara fram. Partarnir eru sinnaðir at taka trupulleikarnar upp til viðgerðar, so tað er vert at royna, metir formaður Javnaðarfloksins í stuttari viðmerking.



*Bjarni Djurholm heldur seg kunna diktera nakrar loysnir, men tað ber bert til at finna loysnir saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, viðmerkir Jóannes Eidesgaard um nýggju uppskotini um viðurskifini á arbeiðsmarknaðinum*